# Hvølpalív í Hoydølum

**Hóskvøldið vóru sjey fittir hvølpar á hvølpaskeið hjá hundafelagnum Huff í Hoydølum. Kanska varð ikki lurtað so væl eftir, tí hinir hundarnir vóru nógv meira spennandi enn skeiðleiðararnir**



*Tara er ein vælvandur hvølpur, hon dugur bæði at sita og at geva labba*



*Hesir báðir høvdu bara eygu fyri hvørjum øðrum*

HUNDASKEIÐ
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Tað var kærleiki í luftini beinanvegin, tá ið sjey fittir hvølpar hittust í Hoydølum í gjár. Lítla tíkin Ronja vísti nógv meira áhuga fyri einum seks mánaðar gomlum cocker spaniel, enn hvat Nina Brockie, ein av skeiðleiðarunum, hevði at siga um, hvar ein hundur skuldi gera síni ting. Líkamikið hvussu eigaranir ryktu og skryktu í hundasnórarnar, so vórðu lítlu hundarnir ósundurskiljandi. Væl var snoddað, onkutíð var eitt sindur av samanbresti, men fyri tað mesta sótu hesir báðir hundanir, ið ikki hava vigað meira enn 5 kilo tilsamans, hugtiknir og hugdu hvør at øðrum.

### Eigararnir hava altíð feilin

Men tað vórðu kanska ikki hvølparnir, ið skuldu á skeið. Tí leiðarin á skeiðnum hetta kvøldið, Fríðhild Debes, sigur avgjørd, at tað eru altíð eigararnir, ið hava feilin av at eiga ein óargaligan hund.

– Hetta skeiðið er mest fyri at læra eigaran, hvussu ein hundur skal handfarast. Tað eru tað verri enn so øll, ið fáa sær hund, sum vita, sigur Fríðhild.

Og, júst sum tá ið ein gongur í skúla, so sæst væl, hvørjir næmingar hava gjørt sítt heimaarbeiði, og hvørjir, ið ikki hava.

– Tað er rættiliga lætt at læra ein hvølp. Eigarin skal bara hava eitt sindur av toli, og gera tað, ið vit læra hann her, so lærur hundurin tað skjótt. Vit síggja beinanvegin, um ein eigari hevur gjørt sítt heimaarbeiði ella ikki, sigur Fríðhild.



*Tíkin Cheeba lærir at sita*

### Kavahundur av rang

Tað gekk rættiliga væl hjá øllum eigarum á skeiðnum. Venjingarnar gingu eftir vild hjá flestu hvølpum. Teir dugdu at sita, at fáa kontakt við eigaran, at ganga pent í bandi, men tá ið hundarnir skuldu sleppast leysir, ja, tá vildu hvølpaeigararnir ikki sleppa hundunum leysum.

Ein djarvur eigari avgjørdi tó at royna. Tað skuldi hann kanska ikki havt gjørt, tí snjóhvíta labradortíkin Tara vildi ikki koma aftur. Líkamikið hvussu rópt varð, so var kavin, ið lá tjúkkur í Hoydølum, nógv meira spennandi.

– Hon elskar kava. Hon er ikki til at fáa inn aftur, tá ið tað er kavi, so nú verður verri, sigur eigarin, tá ið hann forpøstur roynur at fanga tíkina.

Tað vísur seg skjótt, at tað er ikki kavin, ið hevur fangað Taru. Hon hevur funnið sær ein breyðbita, allarhelst ein gamlan matpakka hjá einum av studentunum í Hoydølum.

### Allir hundar kunnu venjast

Umframt vanligar hundar sum labrador og tann tiltikna vagabondin í Føroyum, so var nakað so sjálvsamt sum eitt brøðrapar av cocker spaniel við á skeiðnum. Onkur hvølpur hevði enntá kosta heilt upp til 8000 krónur, men tað sigur Fríðhild ikki hevur so stóran týdning.

– Tá ið eg venji hundar, so eru allir hundar høvd og hali; tað, ið er ímillum, hevur ikki so stóran týdning, tí eg eri vís í, at allir hundar kunnu venjast.

Hetta heldur undirritaða verða løgið, tí øll kenna væl til, at tað er trupult at læra gamlan hund at sita, men hesum er Fríðhild óeinig í.

– Eg eri heilt vís í, at allir hundar kunnu venjast. Tað er sjálvandi lættari at venja hvølpar, men gamlir hundar kunnu avgjørt eisini venjast.

### Hundakalt

Tað var rættiliga kalt fyri menniskjaføtur at standa ein heilan tíma í tí djúpa kavanum á grasfløtuni frammanfyri studentaskúlan í Hoydølum, men verri var fyri hvølpalabbar. Kølsvarta labradortíkin Cheeba vildi helst sleppa heim til Hvalvíkar. Hon ballaði seg inn í fangið á eigara sínum, og hugdi við biðandi eygum. Onkur hvølpur var enntá farin at ristast. So tá ið farið var til hús, so vórðu tað ikki bara menniskju, ið vórðu glað. Hvølparnir sveiggjaðu eisini glaðir við halanum.



*Ein King Charles cocker spaniel var eisini við á skeiðnum*

# Ungur hundavenjari

**Jonna Jensen úr Tórshavn er einans 23 ára gomul, men hon er nú væl á veg til at venja seg til hundavenjara**

HUNDAVENJING
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

– Um hundurin leypur upp á teg, so skalt tú venda tær við. Orðini eigur 23 ára gamla Jonna Jensen úr Havn. Hon er í ferð við at hjálpa einum hundaeigara at venja hvølp sín av við óvanan at leypa upp á fólk á hvølpaskeiði í Hoydølum.

Í hesum døgum er hon í holtur við at útbúgva seg til hundavenjara, tí hennara stóri áhugi hevur altíð verið hundar.

– Mær hevur altíð dámt sera væl hundar. Tískil valdi eg, at melda meg til eitt hundavenjaraskeið, ið eitt par frá Dansk kennel klub skipaði fyri á páskum í Føroyum í fjør. Vit vórðu eini 20 fólk á skeiðum, men vit eru einans eini 10 fólk, ið enn hanga í. Vit eru enn á byrjanarstøði, men heilt skjótt, so verða vit útbúgvnir hundavenjarar, sigur Jonna.



*Jonna Jensen*

### Ikki eitt mótarák

Ì hesum døgum er tað ikki sørt av einum mótaráki at fáa fólk at venja hundar. Fleiri sjónvarpssendingar eru um evnið, men Jonna metur ikki, at tað er tí, at hon fór at útbúgva seg til hundavenjara.

– Nei, her er tað viljin, ið drívur verkið. Tað er í øllum førum ikki lønin, tí hon er ikki stór, flennur Jonna.

Tað vísur seg, at Jonna dugur síni ting. Óargaligi hvølpurin, ið fyri løtu síðani hoppaði upp á øll fólk hann sá, situr nú fittur og friðarligur og bíðar eftir at fáa sín góðbita.

## Lær børnini at handfara hundar

**Í næstum fer hundafelagið Huff at ferðast kring skúlarnar í Føroyum at læra skúlanæmingar at handfara hundar**

HUNDAVENJING
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

– Tað eru verri enn so øll børn, ið duga at handfara hundar. Tað er ei undarligt í, at hundar bíta, tí børnini duga ikki at virða mørkini hjá hundinum. Hetta er helst tí, at foreldrini ikki duga at læra børnini at handfara hundar. Soleiðis sigur Fríðhild Debes, ein av liminum í hundafelagnum Huff.

Fyri at betra um hesa støðu, fer hundafelagið í næstum at ferðast kring fólkaskúlarnar í Føroyum at læra børnini at handfara hundar. Fríhild metur, at hetta tiltakið er hart tiltrongt.

– Tað eru í øllum førum nógvir góðir hundar, ið verða skotnir, tí at børnini fara ov langt. Hundarnir verja bara síni rættindi sum hundur.

### Framsýning av rasuhundum

Í summar fer hundafelagið Huff eisini at skipa fyri áhugaverdum framsýningum av øllum reinum rasuhundum í Føroyum. Vælroyndur dómari frá Dansk kennel klub kemur at sýna hundarnar.